




**Terje Davidsen (60)**
fyrrverandi tannlækni í Kollafirði

***Hvat fært tú gerandisdagin at ganga við?***
- Eg skifti mær mjødnina fyrr í ár, og havi tí gingið heima eitt skifti. Eg havi nú havt góða tíð at vitja fólk, grannar og familjuna. Beint áðrenn tú ringdi í áðni, var eg júst og vitjaði her í grannalagnum.

- So kann eg nevna, at dóttir okkara, Jóna Mikala sum býr í Danmark var og vitjaði heima í summar. Annars hava vit verið ein túr í Suðuroy í summar. Tað er tað longsta, vit hava verið í ár.

***Tú sat á tingi fyri Sambandsflokkin frá 1990-94. Hvat heldur tú um føroyskan politikk í dag?***
- Tað er ikki lætt at vera politikkari í dag, tí tað eru so strammar tíðir, har stórar sparingar mugu gerast á mongum økjum, t.d. á sjúkrahúsum og á røktarheimum. Ringu tíðirnar gera tað sera tungt at stýra landinum - eingin ivi um tað.

- Men tá ein hugsar um tað flokspolitiska arbeiðið, so hevði mær dámt munandi betur, um flokkarnir sjálvir vóru meiri samdir innanveggja - altso, at ein flokkur stendur saman sum EIN flokkur.

***Tú gavst sum tannlækni á jólum í fjør. Men ert tú púrasta farin frá tannlæknastóli og bori?***
- Nei. Eg havi onkutíð áður hugsað tankan um at sleppa at síggja eitt sindur meiri enn tað, sum er her í Føroyum. Eg havi nú kannað møguleikarnar at fara til Grønlands at arbeiða sum tannlækni eitt skifti. Og gongst sum ætlað, verður tað helst til tað í nærmastu framtíð.

snorri@sosialurin.fo

# Poseidon á royndarveiðu í Eysturgrønlandi

**ROYNDARVEIÐA** **Reiðaríið Thor í Hósvík og grønlendska heimastýrið og Royal Greenland hava avtalað, at Poseidon, sum herfyri kom til Føroya úr Kyrrahavinum, skal fara á royndarveiðu eftir pelagiskum fiskasløgum í 2 til 3 mánaði**

Jan Müller

Avtalan snýr seg um, at Poseidon skal royna eftir makreli, rossamakreli, sild og gulllaksi norðan fyri 66 gradir í Eysturgrønlandi. Skipið fer til Grønlands í næstum. Hetta fræ简ttist frá keldum á oljuráðstevnu í Stavanger nú um dagarnar.

Sum skilst hava grønlendingar tikið hetta stigið fyri at tryggja sær søgulig rættindi sum strandaland, um pelagiskur fiskiskapur tekur seg upp í Eysturgrønlandi. Tað eru hesi rættindi eitt føroyskt reiðarí nú skal til at hjálpa grønlendingum við. Sjálvir hava grønlendingar eingi skip, sum kunnu royna eftir pelagiskum fiski í Eysturgrønlandi, og tí kemur tað væl við hjá teimum, at




Poseidon er til taks til royndarveiðu.

Sambært avtaluni skal Poseidon fyrisbils veiða 8000 tons. Thor tekur við hesum ein stóra váða á seg, um einki er til at pelagiskum fiski í Eysturgrønlandi. Hinvegin, gongst væl, so eru skaptir møguleikar fyri framtíðar samstarvi millum Thor og Royal Greenland.

Enn veit man lítið og einki um møguleikarnar at fáa pelagiskan fisk í Eysturgrønlandi. Fyrr hevur avmarkað veiða verið eftir lodnu og sild. Stórur makrelur er annars veiddur beint hinumegin íslendska markið. So vónirnar eru góðar, at til ber at raka við eitt nú makrel. Nógv er til av kongafiski og toski í Eysturgrønlandi, og tað skuldi merkt, at her er nokk til av føði.

Keldan sigur, at Poseidon og Athena, sum í løtu innfrysta markrel frá føroyskum skipum í føroyskum sjógvi, fara til Vesturafrika seinast í hesum árinum. Men um so er at tað fer at ganga væl í Grønlandi er eisini møguleiki fyri at víðka um royndarveiðuna har. Ætlanin er møguliga, at Fønix, sum Thor herfyri keypti, fer við sum hjálparskip til Grønlands. 120 mans eru við Poseidon, føroyingar á brúnni og í maskinrúminum og annars russar, kinverjar og peruvianar.

jan@sosialurin.fo

## Í MORGIN




Lot til andøvsgul av suðri, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av landsynningi. Turt og sólglottar, men mjørkaflókar og hitin millum 12 og 15 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

## LEYGARDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 16 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1024 hPa. yvir Norðsjónum fer norðureftir og mennist nakað. Eitt lágtrýst, 988 hPa. – ex "Daniella"- á 43N-33w fer í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað, so lýggj luft rekur av landsynningi móti Føroyum .

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

**Hitalagið kring knøttin**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 1. sept | Seinna kvarter |
| 8. sept | Mánin næstur jørðini |

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. sept | 00:37 | 12:57 | 11:57 | - | - | 12:12 | 02:37 | 14:57 | 03:37 | 15:57 | 11:12 | - | 10:12 | 23:04 | 00:52 | 13:12 | 01:52 | 14:12 | 00:22 | 12:42 | 01:37 | 13:57 |
| 2. sept | 01:49 | 14:14 | 00:49 | 13:14 | 01:04 | 13:29 | 03:49 | 16:14 | 04:49 | 17:14 | 00:04 | 12:29 | 11:29 | 23:55 | 02:04 | 14:29 | 03:04 | 15:29 | 01:34 | 13:59 | 02:49 | 15:14 |
| 3. sept | 02:40 | 15:06 | 01:40 | 14:06 | 01:55 | 14:21 | 04:40 | 17:06 | 05:40 | 18:06 | 00:55 | 13:21 | - | 12:21 | 02:55 | 15:21 | 03:55 | 16:21 | 02:25 | 14:51 | 03:40 | 16:06 |
| 4. sept | 03:32 | 15:58 | 02:32 | 14:58 | 02:47 | 15:13 | 05:32 | 17:58 | 06:32 | 18:58 | 01:47 | 14:13 | 00:47 | 13:13 | 03:47 | 16:13 | 04:47 | 17:13 | 03:17 | 15:43 | 04:32 | 16:58 |
| 5 . sept | 04:24 | 16:51 | 03:24 | 15:51 | 03:39 | 16:06 | 06:24 | 18:51 | 07:24 | 19:51 | 02:39 | 15:06 | 01:39 | 14:06 | 04:39 | 17:06 | 05:39 | 18:06 | 04:09 | 16:36 | 05:24 | 17:51 |

Kelda. Álmanakkin 2010